# Gera rampu til Norrønu í Kollafirði

**Í sambandi við víðkanina av havnarøkinum á Oyrareingjum fer Tórshavnar Kommuna at gera eina rampu, sum ger tað gjørligt hjá Norrønu at leggja at í Kollafirði, tá ið umstøður ikki eru til at leggja at í Havn**

NEYÐHAVN TIL NORRØNU
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Havn vil fegin, at Norrøna altíð leggur at í Tórshavnar Kommunu, og tí verður ein rampa gjørd á Oyrareingjum, soleiðis at Norrøna kann leggja at har, tá ið veðrið ikki er til at leggja at í Havn*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Tekniska nevnd hjá Tórshavnar Býráð arbeiðir í løtuni við einum máli um víðkanini av havnarøkinum hjá kommununi, og í hesum sambandi verður nýggj bryggja gjørd á Oyrareingjum.

### Hava Norrønu í kommununi

Nýggja bryggjan, ið skal gerast á Oyrareingjum, verður í fyrstu atløgu 150 metrar long. Økið, sum liggur uppat bryggjuni, er umleið 25.000 fermetrar til støddar.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at byggingin av nýggju bryggjuni partvís verður gjørd í samstarvi við Samskip, sum skal byggja ein bygning á økinum.

Harumframt hevur býráðið eisini ætlanir um at gera eina rampu við bryggjuna, soleiðis at Norrøna kann leggja at á Oyrareingjum, tá ið umstøður ikki eru til tað í Havn.

- Vit ætla at gera eina rampu, ið til støddar verður umleið helvtina av rampuni, ið Norrøna nýtir í Havn, og hetta skuldi verið nóg mikið til, at Norrøna kann nýta havnina á Oyrareingjum, tá ið hon hevur tørv á eini neyðhavn, sigur Heðin Mortensen.

Spurdur um hetta stig verður tikið fyri at forða fyri, at Runavík skal gerast neyðhavn hjá Norrønu, sigur borgarstjórin í Havn:

- Hetta verður ikki gjørt fyri at forða runavíkingum í nøkrum. Vit meta bert, at tað er eitt gott hugskot at gera nýggju bryggjuna á Oyrareingjum soleiðis, at Norrøna eisini kann nýta hana. Eg haldi eisini, at tað er best, um Norrøna fær lagt at í Tórshavnar Kommuna, har hon hoyrir heima, sigur Heðin Mortensen.

### Tilkoyring frá tunnilsmunnanum

Í sambandi við ætlanirnar á Oyrareingjum er væntandi, at talan fer at gerast um nógva tunga ferðslu til og frá økinum, og hvussu hesin spurningur skal loysast, arbeiðir býráðið eisini við í løtuni.

Heðin Mortensen greiðir frá, at í fyrsta umfari verður koyrt til økið eftir verandi vegi, men í framtíðini kundi Tórshavnar Kommuna gott hugsað sær, at ein tilkoyring var gjørd frá landsvegnum áraka tunnilsmunnan við Kaldbakstunnilin oman til nýggja havnaøkið. Hetta er tó eitt landspolitiskt mál, sum Tórshavnar Kommuna tó fegin vil verða við til at fremja í verki, sigur Heðin Mortensen.

Alt projekti við nýggju bryggjuni á Oyrareingjum verður væntandi liðug á vári komandi ár, og samlaði kostanðurin fyri projektið verður mettur at verða um 45 milliónir krónur.

## Samskip keypir meira í Føroyum

Íslendska felagið Samskip hevur keypt alt frystigoymsluvirksemi hjá Kloosterboer í Føroyum, Hollandi, og Noregi. Talan er um 84 túsund tons av goymsluplássi, sum Samskip hevur kannað sær. Samskip vónar, at hetta fer at styrkja um støðuna hjá felagnum á marknaðinum í Europa. Keypsprísur er ikki upplýstur.

- Hetta merkir at vit kunnu bjóða eina nógv breiðari tænastu, enn hvat vit hava gjørt frammanundan. Nú bjóða vit frystigoymslu til fisk. Vit sigla frammanundan á Kollafjørð, og Kloosterboer hevur avgreitt okkum har, men ta avgreiðsluna hava vit nú sjálvir, sigur Joel í Leitinum, stjóri í Samskip í Føroyum.

- Vit kunnu spenna okkum meira út við teimum møguleikum, sum eru fyri at fáa fremmand skip at landa í Føroyum. Vit halda, at vit við hesum hava ein kappingarfyrimun. Kloosterboer er eitt sera væl útviklað goymsluhús við einum kapasiteti upp á 7000 tons. Vit síggja stórar vakstrarmøguleikar í Kollafirði, sigur Joel í Leitinum.

**-hkm**

# Ergoterapeutar lætta um gerandisdagin hjá brekaðum

**Føroysku ergoterapeutarnir hava nú skipað seg í egið fakfelag. Í felagnum eru í dag 40 limir, og ætla hesir at vísa á tørvin fyri arbeiði felagsins í framtíðini**

FAKFELAG
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nevndin í nýstovnaða Ergoterapeutfelagnum er farin til verka, og hevur sett sær stór mál fyri framtíðina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Vit hava nógva vitan um tey øki, ið hava við rehabilitering og habilitering av fólki við avmarkaðum førleika.

- Fyri at henda vitanin skal koma brúkaranum til góða, er neyðugt at ergoterapeutar verða settir í starv innan fyri allar skipanir, har arbeitt verður við rehabilitering.

So greið er útmeldingin frá nýstovnaða Ergoterapeutfelagnum, sum í februar mánaði sá dagsins ljós.

Limirnir í felagnum hava síðani 1986 verið limir í danska felagnum. Nú er felagið skipað sum eitt reint føroyskt felag við Hannu á Reynatúgvu sum forkvinnu.

Ætlanin er at samstarva við onnur norðurlendsk feløg. Eitt av málunum er at fáa ergoterapeutar í størv innanfyri allar skipanir, eisini á leiðslustøði innan fyri almannaverkið, skúlaverkið og heilsuverkið.

Í nývaldu nevndini sita: Hanna á Reynatúgvu, forkvinna; Súna Mørk, næstformaður; og nevnarlimirnir Súsanna Winther Poulsen, Birita Thomsen og Turið Jacobsen.

Í samband við stovnanina verður almenn móttøka hildin í hølunum hjá felagnum í Jákupsstovu komandi fríggjadag millum kl. 14 og 17.

### At vera virkin

Føroysku ergoterapeutarnir ætla rættiliga at gera vart við seg í framtíðini.

Tær hava við áhuga fylgt við í visjónini, sum løgmaður hevur skotið út í kortið fyri ár 2015.

- Ergoteraeputar hava servitan innan rehabilitering og habilitering og bjóða seg tí fram til vera við til at fremja hesa visión innan rehabilitering og habilitering í 2015, siga tær.

Tær hava lært í Danmark og hava autorisation frá Sundhedsstyrelsen at virka sum ergoterapeutar. Sum hinar miðallongu heilsufakligu útbúgvingarnar, er tann ergoterapeutiska útbúgvingin eisini ein bachelor útbúgving.

Kjarnan í ergoterapi er týdningurin av at vera virkin í øllum lívsins viðurskiftum. Heilsan, og tað at vera virkin, eru nær tengd at hvørjum øðrum. Heilsutrupulleikar kunnu gera, at ein hevur trupulleikar at vera virkin og hevur ein ikki møguleika at vera virkin, kann hetta geva heilsutrupulleikar.

Endamálið við ergoterapeutisku viðgerðini er sostatt, at brúkarin við kropsligum og sálarligum breki fær ein so virknan og sjálvstøðugan gerandisdag sum tilber við dagligum uppgávum, sum eru neyðugar og ynskiligar fyri hann.

- Her verður hugsað um uppgávur, sum bæði hava við eginumsorgan, arbeiði og frítíðarítriv at gera, siga ergoterapeutarnir.

### Klassifikatión

WHO hevur nýliga gjørt eina klassifisatión av breki, kallað International Classification of Functioning (ICF), sum m.a. hevur støði í "Fyrimyndarreglunum um javnar møgulleikar fyri fólk, ið bera brek" hjá ST.

Í londunum rundan um okkum arbeiða ergoterapeutar og aðrir fakbólkar innan heilsu- og almannaverkið miðvíst út frá hesari klassifikatión.

ICF sær ikki eitt brek einans við medisinskum eygum, men sum eina funktión av sjúkuni ella brekinum og umstøðunum hjá tí sjúka ella brekaða og umhvørvinum, viðkomandi skal virka í v.m. Hetta samsvarar væl við tað, sum ergoterapeutar leggja dent á í teirra viðgerð og tiltøkum.

Ergoterpeutar eru fáir í tali í mun til fakbólkarnar, teir samstarva við. Tí er tað ein sjálvfylgja fyri ergoterapeutar at arbeiða tvørfakligt.

- Ergoterapeutar hava sostatt nógva vitan, sum tørvur er á innan øll øki, sum hava við rehabilitering og habilitering av fólki við avmarkaðum førleika at gera.

- Fyri at hendan vitanin skal koma hesum brúkarum til góða, er neyðugt at ergoterapeutar verða settar í starv innanfyri allar skipanir, eisini á leiðslustøði, har arbeitt verður við rehabilitering og habilitering, m.a. innanfyri almannaverkið, skúlaverkið og heilsuverkið, siga tær í nýstovnaða felagnum, og ætla at gera vart við hendan tørvin bæði í fjølmiðlum, á politiskum støði og aðrastaðni.

## Arbeiðsøkini

**hjá ergoterapeutum eru fjølbroytt og kunnu vera:**

- Barnaøkið
- Eldraøkið
- Brekaøkið
- Sálarliga sjúk
- Sjúkrahús
- Arbeiðsumhvørvi
- Fyribyrging
- Heilaskadd, bæði viðfødd og seinheilaskadd
- Demens
- Hjálpartól og atkomuviðurskifti

## Samskip keypir meira í Føroyum

Íslendska felagið Samskip hevur keypt alt frystigoymsluvirksemi hjá Kloosterboer í Føroyum, Hollandi, og Noregi. Talan er um 84 túsund tons av goymsluplássi, sum Samskip hevur kannað sær. Samskip vónar, at hetta fer at styrkja um støðuna hjá felagnum á marknaðinum í Europa. Keypsprísur er ikki upplýstur.

**-hkm**